NFT ORIGO AS

NY ISTID!

Med Origo is - systemer
Luft-issørpe

*Origo har levert 12 issørpe-anlegg fra april 04*
*Vi takker for oppdragene*

- Enkel å bruke
- Kompakt størrelse
- Holder kvaliteten på råstoffet
- Sparer energi
- Lavere investering
- Vedlikeholdsvennlig
- Leveres etter ønske fra kunden
- Vi kan tilby finansiering
  CE sertifisert



**Øk kvalieten på råstoffet med Origo issystemer - luft-issørpe**

Det finnes ikke noe kjølemedium som er
**KALDERE, RENERE, MINDRE OG RASKERE**
enn Origo sin luft-issørpe blanding.
Produseres av mikroskopiske iskrystaller,
bittesmå luft- eller vannbobler

**Postboks 152 - 8509 Narvik - Tlf. 76 94 77 50 - Faks 76 94 77 51**
**E-post: n.f.t@online.no - www.floice.com**

# Vætrar í Miðbýnum



*Hesar trý verða helst millum teirra, sum til ber at síggja í Miðbýnum í Havn komandi fríggjadag*

Eins og tey hava gjørt tað tey bæði seinastu árini, fara næmingar á Læraraskúlanum aftur í ár at skipa fyri gøtusjónleik í Miðbýnum í Havn.

Talan er um næmingar á fyrsta lestrarárinum á Læraraskúlanum, og er talan um tvørfakliga verkætlan, sum fevnir um handverk og list.

Heitið á sjónleikinum er »Jólavætrarnir koma til bíggjar«, og verða bæði vætratónleikur, vætradansur og vætragykl á skránni. Eisini verða djór at síggja, og í tíðindaskrivi verður sagt, at talan m.a. verður um gæs, høsn og kaninir, eins og onkur seyður eisini verður at síggja.

Umframt at vera mennandi fyri fakliga førleikan hjá næmingunum, er endamálið við verkætlanini eisini at venja tey við tvørfakliga arbeiðsháttin, sum seinnu árini er vorðin alt meira nýttur innan skúlagátt.

Leikurin verur sýndur komandi fríggjadag kl. 16.00 á økinum millum Sparikassan og Kioskina á Vaglinum. Samstundis verða gøturnar í Miðbýnum stongdar.

**-jm**




**NOREG**

**1 VIKA Á PERS HOTEL**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
16/9-04 – 28/5-05* **úr 6.995,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.
*Í tíðarskeiðnum 30/10-04 – 12/3-05 siglir Norröna ikki til Noregs.

**HETLAND**

**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
16/9-04 – 28/5-05 **úr 5.570,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 9 dagar í summarhúsi.

**HETLAND-CRUISE**
**HÓSDAG TIL MÁNADAG**
PRÍSUR VIÐ HOTELLGISTING
16/9-04 – 28/5-05 **úr 1.500,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 2 nætur á hotelli.

**DANMARK**

**1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
Í HIRTSHALS, EBELTOFT & TRANUM KLIT
16/9-04 – 28/5-05 **úr 5.895,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
16/9-04 – 28/5-05 **úr 6.995,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.





**FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1**
**FRAM OG AFTUR VIÐ BILI**

**Til Danmarkar úr 3.270,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Noregs úr 1.920,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Hetlands úr 1.680,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Lerwick og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Íslands úr 2.640,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

*Tilboðið er ikki galdandi hesar fráferðir: 6/1, 17/3 og 24/3

**BERGEN-CRUISE**
**Vikuskiftisferð við bili**

**Fyri hvønn einans 1.360,-**
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Bergen í dupultkamari við wc/bað.

SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo



# Politikararnir hjúkla um privat áhugamál

**- Ein hin álvarsligasta forðingin fyri at Føroyar kunnu røkka sama inntøkustøði sum grannalondini er, at almenna umsitingin í Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum framvegis er alt ov veik til at virka sum munadygg verja av áhugamálunum hjá borgarunum um hægri vælferð, mótvegis kradding frá seráhugamálum, sigur Búskaparráðið í nýggjastu frágreiðingini**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*– Almenna uppgávan er at umboða borgaran í hesum spælinum, tað vil siga í øllum samskifti við fyritøkur og aðrar seráhugabólkar at umboða áskoðanina um, at tað er vælferðin hjá øllum føroyskum borgarum sum telir, og ikki einstakar fyritøkur, vinnubólkar, arbeiðspláss ella líknandi. Tað almenna skal í hesum viðurskiftum verja áhugamálini hjá øllum borgarum, ikki bara núlivandi, men eisini hjá komandi ættarliðum, skrivar Búskaparráðið í feskastu frágreiðingini.*

Hósdagin kom seinni partur av árligu konjukturfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum. Seinnu partur snýr seg um inntøkustøðið í Føroyum, har nevndin í Búskaparráðnum hevur sett sær fyri at kanna, hví føroyska samfelagið ikki er eins ríkt og onnur samfeløg.

Eins og í fyrra parti av konjukturfrágreiðingini, leggur Búskaparráðið heldur ikki hesaferð fingrarnar í millum. Politiski myndugleikin fær enn einaferð av at vita frá Búskaparráðnum. Ráðið finst harðliga at politikarunum fyri geva vinnuligum seráhugamálum ov stóra ávirkan, tá vinnupolitikkurin skal orðast. Sambært Búskaparráðnum er hetta ein álvarsom forðing hjá føroyska samfelagnum fyri at røkka sama inntøkustøðið sum okkara grannalond.

- Ein hin álvarsligasta forðingin fyri at Føroyar kunnu røkka sama inntøkustøði sum grannalondini er, at almenna umsitingin í Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum framvegis er alt ov veik til at virka sum munadygg verja av áhugamálunum hjá borgarunum um hægri vælferð, mótvegis kradding frá seráhugamálum, sigur Búskaparráðið.

## Serliga fiskivinnan

Búskaparráðið heldur, at tað er serliga áhugabólkarnir innan føroysku fiskivinnuna, sum alt ov lætt hava fingið kvørkratak um politiska myndugleikan. Fremsta orsøkin til, at serliga áhugabólkarnar í fiskivinnuni hava so stórt vald á politiska myndugleikanum er illusjónin um, at fiskivinnan er einasta beini, føroyska samfelagið hevur at standa á.

– Statiska illusjónin( um at fiskivinnan er okkara einasta grundarlag, blðm) gevur áhugabólkum í útflutningsvinnuni og serliga í fiskivinnuni góðar møguleikar fyri lobbyvirksemi, tað vil siga fyri at avírka almennar uppfatanir av, hvussu búskapurin er háttaður. Tað einasta tey skulu sannføra veljaran um er, at av tí at "fiskivinnan er beinið, føroyski búskapurin stendur á", er tað neyðugt at tryggja, at vit hava ríkiligt av skipum, sjómonnum, flakafólki, alifyritøkum, sláturvirkjum o.s.fr. Um neyðugt má hetta tryggjast við studningum, bæði við generellum studingum, so sum skattafrádrátti og alment tryggjaðari minstuløn, og harafturat við meira specifikkum studningum til útvaldar fyritøkur, til dømis fiskiloyvir, "skattaafturbering" ella "tollendurgjald", stendur skrivað í frágreiðingini um inntøkustøðið í Føroyum.

Búskaparráðið heldur, at politikararnir í alt ov stóran mun leggja seg eftir at lurta eftir vinnuni.

– Í Føroyum er tað ein stórur trupulleiki, at ofta verður lurta eftir, hvat verandi luttakarar á einum marknaði hava at siga um ymisk viðurskifti. Verandi luttakarar hava sjálvsagt virðismikla vitan um marknaðin, og harafturat hava teir ein demokratiskan rætt at leggja síni sjónarmið fram. Men minnast má, at hesir luttakarar á marknaðinum arbeiða fyrst og fremst fyri egin áhugamál, sigur Búskaparráðið

Búskaparráðið fýlist eisini harðliga á, at sjónarmiðini hjá seráhugamálunum í fiskivinnuni sleppa at kveistra árligu metingarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum er stovnurin, sum skal tryggja, at áhugamálini hjá tí almenna verða varðveitt á haldgóðan hátt.

– Umframt at fáa tilfeingið ókeypis frá landinum avgera verandi aktørar í vinnuni eisini sjálvir, hvussu teir fara við tí. Landið hevur ein ráðgeva á økinum, nevnliga Fiskirannsóknarstovuna, men hesin ráðgevi verður konsekvent settur til viks, og sjónarmiðini hjá seráhugamálunum vinna frama. Tað er enntá komið so langt, at politiska magtin hjá seráhugamálunum í fiskivinnupolitikkinum er stovnsfest við Fiskidaganevndini. Gjøgnum hesa nevnd áseta ymsu reiðarabólkarnar í veruleikanum sjálvir, hvussu nógvar fiskidagar limirnir í bólkunum skulu hava, tí tilmælini frá Fiskidaganevndini vera altíð fylgd meira ella minni nágreiniliga

## Borgarin burtur

Eins og í fyrra partið av konjukturfrágreiðingini vísir Búskaparráðið í sínum frágreiðing um inntøkustøðið í Føroyum á, at avgerðirnar hjá politiska myndugleikin í alt ov lítlan mun byggja á, hvussu vælferðin hjá einstaka borgaranum í Føroyum kann hækka.

– Almenna uppgávan er at umboða borgaran í hesum spælinum, tað vil siga í øllum samskifti við fyritøkur og aðrar seráhugabólkar at umboða áskoðanina um, at tað er vælferðin hjá øllum føroyskum borgarum sum telir, og ikki einstakar fyritøkur, vinnubólkar, arbeiðspláss ella líknandi. Tað almenna skal í hesum viðurskiftum verja áhugamálini hjá øllum borgarum, ikki bara núlivandi, men eisini hjá komandi ættarliðum, skrivar Búskaparráðið.

### FAKTA

Búskaparráðið er sett sambært løgtingslóg nr. 120 frá 1995 við seinni broytingum um búskaparráð. Tað ráðið sum nú situr er sett at virka frá 1. januar 2003 til 31. desembur 2005. Sambært grein 3 í lógini um Búskaparráð, skal ráðið minst eina ferð árliga greiða úr hondum frágreiðing um búskaparligu gongdina í Føroyum

**Limirnir í Búskaparráðnum**
*Hermann Oskarsson*, cand.polit, stjóri á Hagstovu Føroya, formaður
*Óli Samró*, cand.polit., stjóri á FAREC
*Una Joensen*, cand.oceon., Føroya Tele
*Marner Jacobsen*, cand.oecon., forstjóri í Føroya Sparikassa
*Gunnvør Balle*, cand.merc., søluleiðari á Tórshavnar Skipasmiðju
*Anna Kass*, M.Sc. í búsk., fíggjarfulltrúi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum
Skrivari: *Jóannes Jacobsen*, cand. oecon

**Endamál:** Landsstýrið skipar Búskaparráð við uppgávu at fylgja búskaparliga gongdin og ráðgeva um búskaparlig viðurskifiti.

# Hermann takkar fyri seg

**1. januar eitur formaðurin í Búskaparráðnum ikki longur Hermann Oskarsson**

BÚSKAPARRÁÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hann hevur verið millum mest umstríddu persónar í samfelagskjakinum í 2004. Sum formaður í Búskaparráðnum síðan 1999 hevur Hermann Oskarsson ikki fírt fyri at siga sína hjartans meining um føroyska búskapin, og tað hevur havt nógvar ákoyringar við sær.

Hermann hevur nú tikið avgerð um at siga seg úr starvinum sum formaður í Búskaparráðnum, men hann fæst ikki at siga, at mongu ákoyringarnar er høvuðsorsøkin til, at hann nú gevst sum formaður.

Við Dimmalætting hósdagin segði Hermann Oskarsson, at tað eru fleiri orsøkir til avgerðina.

– Tað er sum so ikki krevjandi bara at vera formaður, men tað er krevjandi alla tíðina at verða konfronteraður. Tað krevur nógva tíð og orku, segði hann við Dimmalætting.

Hermann Oskarsson varð valdur til skrivara í Búskaparráðnum 1. november 1997 og tvey ár seinni gjørdist hann formaður. Búskaparráðið er valt fyri trý ár í senn, og hetta er onnur setan hjá Hermanni Oskarsson sum formanni.

